# Stórt arbeiði liggur fyri framman

*Vit eru nokkso klárir til 1. útbjóðing, men enn liggja stórar uppgávur fyri framman, sigur Herálvur Joensen, stjóri í oljumálastýrinum*



*Herálvur Joensen, stjóri í Oljumálastýrinum er væl nøgdur við arbeiðið, sum er gjørt higartil.*

JAN MÜLLER

-Eg eri væl nøgdur við tað, sum er komið burtur úr, og eg haldi vit eru klár til at fara undir eina útbjóðing. Hetta sigur Herálvur Joensen, stjóri í Oljumálastýrinum og harvið ein teirra, sum hevur lagt alla orku og kreftir í at fáa eina oljuleiting í gongd. Hann heldur sjálvur, at hetta er ikki minst takkað verið teimum sera arbeiðssomu og dugnaligu fólkunum í Oljumálastýrinum og øðrum fólkum, sum hava arbeitt við hesum spurningum.

Uppá fyrispurning um hann er nøgdur við treytirnar til fyrstu útbjóðing sigur hann, at útfrá tí, sum varð lagt fram á oljuráðstevnu í Aberdeen herfyri, so hava reaktiónirnar verið eitt sindur blandaðar. Tey flestu feløgini hava ikki latið treytirnar ræða seg, men ein hevur kanska ein varhuga av, at okkurt felag, sum man hevur havt samband við, ikki verður við, men hinvegin hava teir eisini fingið onkrar leysar fyrispurningar frá feløgum, sum teir ikki hava havt samband við í langa tíð.

**Kunnu bora í 2001**

Heldur Herálvur Joensen, at oljufeløg verða før fyri at bora ár 2001, nú útbjóðingin verður lýst eitt sindur seinni enn upprunaliga ætlað?

-Tað dugi eg ikki rættiliga at siga. Okkara uppgáva hevur verið at tryggja, at møguleikar verða skaptir fyri, at feløgini kunnu bora í 2001. Men vit hava eina rúgvu av tungum arbeiði, sum skal gerast, her t.d. trygdar- og umhvørviskunngerðir ol. og tað verður skundað undir tað arbeiðið nú. Spurningurin um eina tilbúgvingarskipan hevur sera høgan prioritet.

Sjálvur heldur Herálvur Joensen, um feløgini hava tað sum mál at bora í 2001 og kanska entá seta tað sum tíðarætlan í sambandi við umsóknir á tær arbeiðsskrá-ir tey skjóta upp, so rokni hann við, at tey klára tað.

**Flyta til Hoyvíkar**

Nógva virksemið, sum verður í kjalarvørrinum á, at Føroyar nú loyva oljufeløgum at bora eftir olju og gass, setir stór krøv til bæði pláss og fólk hjá Oljumálastýrinum. Stýrið, sum higartil hevur hildið til í gróthúsbyninginum á Debesartrøð, fer at flyta í bygningin hjá Svend Krosstein í Hoyvík. Talan er um bygningin, har Com Data fyrr helt til. I løtuni verður bygningurin innrættaður til endamálið og Herálvur Joensen sigur, at tey her fara at fáa nógv betri arbeiðsumstøður. Hann vónar, at tey kunnu flyta inn, áðrenn 1. útbjóðing letur aftur. Enn restar so bert ein góðkenning frá Fíggjármálastýrinum at fáa sáttmálan endaliga uppá pláss.

Herálvur sigur, at sjálvandi er við blandaðum kenslum, at man rýmir av Debesartrøð, men her er einki val. Tey fáa meira enn tvífalt so nógv pláss. Sum støðan er nú eru tey noydd til at leiga høli í býnum til fundir ol. Og tað er ikki haldbart í longdini.

Tað verður so eisini brúk fyri eksternari hjálp til tað arbeiði, sum nú liggur fyri framman. Her ikki minst á jarðfrøðiliga økinum. Eitt tað fyrsta, sum nú verður at gera, er at fyrireika seg uppá, hvussu viðgerðin skal fara fram og hvussu teir ymsu bólkarnir, sum skulu viðgera ymsu partarnar skulu setast saman.

Jarðfrøðin er her kanska tað tyngsta arbeiðið og so arbeiðsskráirnar hjá feløgunum. Síðani er tað vinnupolitikkurin, og haraftrat skulu bæði løgfrøðingar og búskaparfrøðingar meta um meira formell viðurskifti so sum fíggjarstyrki og stødd á felag, organisatiónsviðurskifti ol. Eisini skal ein metan av tøkniligu kompetansuni viðvíkjandi boring gerast. Samanumtikið fer tað at áliggja Oljumálastýrinum at gera eitt rættiliga stórt arbeiði, ikki minst tá umsóknirnar verða latnar inn. Freistin at lata inn er 17. mai og hevur landsstýrismaðurin í oljumálum sagt, at miðja verður móti at lata loyvini í september. Tvs. at Oljumálastýrið hevur 3 til 4 mánaðir til hetta so krevjandi og álvarssama arbeiði.

Herálvur Joensen torir ikki at siga, um teir kortini fara at verða lidnir til í august, soleiðis sum ætlanin hevur verið áður. Tað veldst so sjálvandi nógv um, hvussu nógvar umsóknkr teir fáa.

**Ráðstevnur í Føroyum heldur enn í útlandinum**

Herfyri varð skipað fyri stórari oljuráðstevnu um Føroyaøkið í Aberdeen við luttøku av umboðum fyri útlendska oljuvinnu og síðani nógvum fyrilestrarhaldum úr Føroyum eisini. Sosialurin hevur skilt, at føroyskir oljumyndugleikar eru ikki so fegnir um at slíkar stevnur um Føroyar skulu verða í útlandinum, men ein orsøkin til at farið varð á ráðstevnuna í Arberdeen herfyri var helst at kunna upplýsa oljuheiminum um komandi ætlaninar fyri Føroyaøkið.

Sosialurin hevur frætt, at Euroforum, sum skipaði fyri tiltakinum í Aberdeen longu ætlar at fyriskipa eina nýggja ráðstevnu í juni og her leggja dent á trygdar- og umvhørvisspurningar. Men eftir hvat skilst fara føroyskir myndugleikar ikki at vera við til hesa stevnu, um hon verður av nøkrum, tí tað verður arbeitt við hesum spurningum í løtuni.

Vit spurdu stjóran í Oljumálastýrinum, hvørja støðu hann hevur til slíkar stevnur um Føroyar, sum verða fyriskipaðar í útlandinum?

-Eg haldi ikki vit skulu skapa eina tradition, har man sigur, at oljuvinna á føroyska landgrunninum skal viðgerast á ráðstevnum í Aberdeen. Útgangsstøðið má vera, at føroysk oljuvinna gongur út frá Føroyum, eisini tá talan er um ráðstevnur.



*Saman við Martin Heinesensen, leiðara á Jarðfrøðissavninum hevur Her´álvur Joensen mynda fyrireikingarnar til eina komandi føroyska oljuvinnu*

2 ´arin

Leygardagur 19. februar 2000

## Petur



*Heldur tú ikki, at fólk eru troytt av at hoyra upp á teg?*

»Jú, tað ivist eg ikki í. Men tað skulu tey eisini hava loyvi til. Eg eri eisini onkuntíð troyttur av tí, sum eg geri.« Les meira inni í 2‘aranum.

Mynd: Jens Kr. Vang

# Seyðamaður og lívsnjótari

**KÁTUR PENSIONISTUR.**

Hann hevur verið arbeiðsmaður í meiri enn hálva øld og hevur livað eitt dramatisk lív. Nú slappar hann bara av. Møtið pensjoneraða arbeiðsmanninum Jørmundi Vang í Hvalba. Ein maður, tey rópa Tjøran



Mynd: Jens Kristian Vang

*Dánjal Højgaard*

-Je havi nógv at takka fyri. Je eri 72, og havi arbeitt síðani je var 10, og roykt síðani je var 11.

Tað gongur tað mesta av fyrrapartinum áðrenn hann odnar. Tá hann fyrst er komin í gongd, er hann næstan ikki til at steðga.

So fáa vit alla søguna um Jørmund Vang.

Um hvalbingin, sum gjørdist faðirloysingur seks ára gamal. Sum arbeiddi í Kolinum eina fjóðringsøld. Og sum húsastoypari og arbeiðsmaður og fiskimaður í Grønlandi aðra fjórðingsøld.

Nú er hann 72, og tær sterku hendurnar hava lagt frá sær. Livir sum einkjumaður í húsi saman tveimum synum. Ein lívskátur røktingarmaður, barnagenta og húsmóðir, sum elskar viski, nevaleik og enskan dans.

Og sum ikki leggur fingrarnar ímillum, hóast hann manglar nakrar sjálvur.

**Sprongdi fingrarnar**

Ein dagin í november í 1953 varð hann fyri eini spreingivanlukku í Kolinum, Vanlukkan kostaði honum hálvan annan fingur á vinstru hond, og skaddi honum sjónina á øðrum eyga fyri lívið.

-Eg dugi ikki at forklára tað. Vit vóru ferdigir. Høvdu borað og skotið alt og eg var farin út, minnist Jørmund.

-Eg fór bara inn aftur. Eg veit ikki hví. Eg setti taskuna á ryggin og fór heim í skotið, sigur gamli kolamaðurin, sum helt høvdið kalt, tá harðast leikaði á.

-Eg var púra klárur. Teir leikaðu steinørir í. Eg bað teir ikki leika so í, tí vit sluppu ongan veg, tí veðrið var so ringt, sigur hann, sum var tað ein lítil flís, hann hevði fingið í fingurin.

Longutong fór øll sum hon var. Helvtin av ringfingrinum stóð heldur ikki til at bjarga. Men tað ringasta var kortini tann svára pínan, tá ið læknarnir skuldu viðgera eyguni, heldur hann.

-Eg var blindur í 12 dagar. Oy Jesus, oy Jesus, tá ið eg kom í ljósið - tað rann úr eygunum. Tað var verri enn at skjóta meg.

Jørmund fekk avlaminspensjón í boði, men havnaði tilboðnum. Helt seg vera ov ungan at vera invalid:

-Nei, nei, ein 34 ára gamal maður kann ikki brúka tað til nakað. Eg havi klárað meg fínt. Hetta hevur reddað meg, sigur hann og peikar á tann hálva ringfingurin.

-Eg fekk lempað sum vanligt og høgt tað sama við vinstru hond, sum við høgru.

**Røktar seyð**

Jørmund er ein partur av bygdarmyndini í Sandvík og Hvalba. Ein rættur gongumaður, sum eigur mong sporini í bø og haga og óteljandi gonguferðir millum norðastu bygdirnar í Suðuroynni.

-Her eri eg, tá ið eg ikki eri barnagenta, sigur hann og skoðar vælhýrdur yvir trøðna í Sandvík, har hann hevur sína dagligu gongd.

Kappingina um teir tyngstu veðrarnar, sum hvalbingar plaga at ganga høgt upp í, kunnu teir eiga fyri honum.

-45-60 pund, tað er ivaleyst. Mín meining er tann, at seyðurin sum fer upp um 60 pund fer í skrellispannina, sigur hann.

- So lúgva teir eisini um vektina. Sum eg plagi at siga: Teir verða ikki mettir av tí, teir lúgva, sigur Jørmund, sum leggur dent á, at Suðuroyggin nú einaferð er soleiðis skaffað frá náttúrunnar hond, at hon fær ikki borið stóran seyð.

-Seyðurin á Eiði er dupult so stórur sum okkara. Eitt krov upp á 30-40 pund á Eiði, tað er so lítið, at tú sært næstan ígjøgnum síðuna á tí. Seyðurin er so stórur, at hann krevur fryktiliga nógv, og hann kann ikki liva hjá okkum. Fáa vit eitt lamb upp á 25 pund, er tað eitt gott lamb.

**Fínt eyknevni**

Áðrenn tú blaðar fram og lesur víðari, so var tað líka hattar við eyknevninum, sum hvalbingar duga so væl at seta á hvønn annan.

-Tað krevur so lítið at fáa eitt eyknavn.

*-Hevur tú sjálvur eitt?*

-Jú!, svarar hann kvikliga, og fer so at forklára. Um hina ferðina tá ið hann 12 ára gamal skuldi bera ein dunk av tjøru, tí ein bjargalína skuldi tjørast.

-Teir skuldu brúka finska tjøru. Nú fer proppurin av tjørudunkinum, meðan eg beri leypin, so at tað rann niður eftir bakinum.

Síðani tann dag hava teir kallað hann „Tjøran“.

*-Leggur tú nakað í, um tey kalla teg Tjøran?*

-Tað mann vera tað. Nei, tað havi eg ongantíð tikið mær notits av.

***Framhald á miðsíðunum: »Stuttligt er at liva«***